**Hoyring í sambandi við tilmæli um at broyta part B og ávísar ásetingar í parti A í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág**

Takk fyri høvið at verða hoyrd.
Vit hava viðmerkt við bláum.

Skrásetingarráðið kann gera av, at ADHD heilivágur verður útflýggjaður í einari nøgd, sum svarar til 1 mánað nýtslu uttan mun til ordineraðu nøgdina

Hettar eru vit sterkt í móti. Omaná at hava brek, har eitt av høvuðs symptomunum og avbjóðingini er, er at skipa seg og hava yvirblikk og árræði at fáa framt gerandisuppgávur, meta vit, at tað er at leggja stein omaná byrðu, at krevja, at foreldur, ung og vaksin skula hvønn mánaða biðja um heilivág og heinta heilivág.

Landsapotekarin hevur gjørt vart við, at hann hevur ein illgruna um, at rúsandi ADHD heilivágur (Ritalin og Ritalinlíknandi-kopiheilivágur) verður misnýttur og seldur víðari við vinningi fyri eyga.
Orð skapa veruleika!
-Vit halda, at tað er sera ópassandi at Landsapotekarin í einum almennum hoyringsskrivið kallar Ritalin fyri “rúsandi ADHD heilivágur”.  Á hendan hátt er Landsapotekarin við til at stigmatisera ADHD enn meir, og at er við til at geva ta fatan, at heilivágurin er rúsandi.
Minnast skal til, at hettar er heilivágurin, ið hevur hjálpt so nógvum við ADHD til eitt munandi betri lív, og ja, eitt lív uttan misnýtslu.

Við at kalla Ritalin fyri “Rúsandi ADHD heilivág” leggur Landsapotekarin út, at heilivágurin rúsar. Vit vilja staðiliga heita á Landsapotekaran um at vanda sær um orðini, tí Ritalin er IKKI rúsandi heilivágur um hann verður nýttur sum fyriskrivað. Allar allar flestu fólknini taka Ritalin sum fyriskrivað, og verða ikki rúsaði. Tað finnast ein ørgrynna av heilivági, ið kann misnýtast at rúsa seg við, og halda vit, at mynduleikarnir eiga ikki at taka nakran burturúr á hendan hátt, og verða beinleiðis við til at stigmatisera eitt brek, og verða við til at leggja stein omaná byrðu. Vit sum felag hava nevnliga arbeitt í fleiri ár, fyri at koma burturúr hesari stigmatiseringini og er hettar orðavalið við til at niðurbróta okkara stóra arbeiði.

| Tal av borgarum, sum fáa útskrivað ADHD heilivág | |
|---|---|
| Ár | Borgarar |
| 2020 | 678 |
| 2021 | 917 |
| 2022 | 1.254 |
| 0101->19112023 | 1.509 |

| Heilsutrygd – tilskot | |
|---|---|
| Ár | Kr. |
| 2020 | 3.438.134 |
| 2021 | 4.589.871 |
| 2022 | 6.934.164 |
| 0101>19112023 | 11.583.972 |

Sigast kann ikki, hvussu nógv økta nýtslan av ADHD heilivági stavar frá misnýtslu av heilivági. Psykiatriski depilin hevur í fyrispurningi frá Liljuni Weihe, løgtingslimi, “52-079/2022 : Ritalin” ført fram, at ein orsøk til øktu nýtsluna av ADHD heilivági eisini er, at psykiatriski depil hevur fingið hægri játtan og tí hevur kunna útgreinað fleiri fólk fyri ADHD, undir hesum vaksin fólk, ið ikki hava verið útgreinað fyrr.

Síðan 2019 er limatalið hjá ADHD felagnum vaksið úr 28 upp í 580. Orsøkin til at talið var so lítið áðrenn er, at Føroyar hevur verið eftirbátur tá tað kemur til nevropsykiatrisk órógv. Økta tilvitanin um ADHD hevur gjørt, at ódiagosisteraði eru farin at fáa sær hjálp. Tað í sær sjálvum er sera gleðiligt. Í fylgi WHO so hava 5% av fólkunum ADHD. Tølini vísa, at tað eru 1554, sum fáa útskrivað heilivág fyri ADHD. Hettar er sera nógv færri enn 5% av Føroyingum, ið hevði verið eini 2500 í tali. Sostatt er ikki haldbart at siga, at tað er ein ovurnýtsla, ella at økta sølan kann vísa, at heilivágurin verður misnýttur.

Tíverri hava hvørki psykiatriski depilin enn Barna- og ungdómspsykiatriin fylt við og nøkta tørvin á útgreiningum, og tí hava fólk sæð seg noydd an at leita aðrastaðir eftir at fáa útgreining. Sostatt eru tey pressaði út á privata

marknað, sum psykiatriski depilin sjálvur sigur, at summi privat gera ónøktandi útgreiningar.
Psykiatriski depilin vil heldur ikki longur skriva út heilivág til teirra, ið ikki hava útgreining frá teimum. Sostatt er systemið sjálvt orsøkin til, at patientarnir muga út á privata marknaðin at skaffa sær heilivág. Fleiri heilivágsveitarar eru, tess størri er vandin fyri at útskrivað verður heilivágur, ið ikki átti at verði útskrivaður.

Vit halda, at besta loysnin fyri at fáa stýring á heilivágsnýtsluni er, at gera eina ADHD klinikk, sum útskrivar heilivág til vaksin sum børn. Sostatt ber nógv betri til at hava eftirlit og stýra nýtsluni og júst hvør heilivágur skal skrivast út. Á hendan hátt, hevði borið til at minka um nýtsluna av methylphenidate.

Til hetta endamálið kann ADHD heilivágur býtast sundur í tveir bólkar - ávikavist í heilivág, ið inniheldur evnið methylphenidate, og heilivág, ið ikki inniheldur evnið methylphenidate. Hetta tilmæli fevnir bara um heilivág, ið inniheldur evnið methylphenidate. Havast skal í huga, at øll sløg av ADHD heilivági innihalda rúsandi evni og vandi er tí fyri misnýtslu uttan mun til, hvørji átøk verða sett í verk. Tó kann ADHD heilivágur uttan methylphenidate vera torførari at misnýta, tí størri nøgdir av heilivágnum, ella torførari hættir at taka heilivágin, til dømis at innspræna hann í æðrarnar, krevst fyri at fáa ein rús.

Ein loysn uppá avbjóðingina við mis- og ovurnýtsluni er, at Skrásetingarráðið kann gera av, at ADHD heilivágur, ið inniheldur methylphenidate, verður útflýggjaður í einari nøgd, sum svarar til 1 mánað nýtslu uttan mun til ordineraðu nøgdina. Ásett verður sostatt ein avmarking á tíðarskeiðinum, sum heilivágsbrúkarir kunnu fáa útflýggjað ADHD heilivág, ið inniheldur methylphenidate. Hetta ger, at Apoteksverkið skal nokta fyri fleiri ávísingum við tí endamáli at minka um ovurnýtslu, tá heilivágsnýtarin hevur fingið sína mánaðarliga ávísing. Apoteksverkið kann í serligum førum útflýggja heilivágin í einari nøgd, sum svarar til meira 1 mánað nýtslu – til dømis tá talan er um heilivágsbrúkarar, ið eru til sjós, ella sum skulu á longri uttanlandsferðum.

Hendan loysnin verður brúkt í Íslandi. Endamálið við at seta hesar reglur í gildi í Íslandi er, at fyribyrgja misnýtslu av heilivági, tað er ADHD-heilivág, ið inniheldur methylphenidat, til dømis Concerta, Ritalin/Ritalin Uno, Methylphenidat Sandoz og Equasym.

Skotið verður harumframt upp, at apoteksverkið ikki kann útflýggja ADHD heilivág, ið inniheldur methylphenidate, frá forskriftum skrivaðar av læknum uttanfyri ríkisfelagsskapin.

- Av tí at Psykiatriski depilin í september 2023 kom út við nýggjum mannagongdum, har fólk, sum hava fingið staðfest ADHD aðrastaðir enn hjá LS Landssjúkrahúsinum, skulu aftast í køina fer hettar at føra við sær, at fólk við ADHD, ið flyta til Føroyar úr londum uttanfyri ríkisfelagsskapin, nú skula bíða í 24 mánaðir til at fáa heilivág. Hettar ber ikki til. Um so er at hettar kemur í gildi, so eiga hesi at sleppa framat psykiatriini fyri at fáa heilivág útflýddan, soleiðis at tey ikki risikera ongan heilivág at hava.

Landsapotekarin upplýsir, at í dag fáa áleið 754 heilivágsbrúkarar útflýggjað heilivág við methylphenidate og fáa áleið 800 heilivágsbrúkarar heilivág uttan methylphenidate. Hetta tilmæli hevur avleiðingar fyri teir 754 heilivágsbrúkarar, ið fáa útflýggjað heilivág við methylphenidate. Hesir heilivágsbrúkarar skulu møguliga oftari á apotek eftir heilivágnum. Eisini vera fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar av, at læknin skal ávísa oftari og apoteksverkið skal útflýggja oftari til hesar heilivágsbrúkarar. Væntað verður, at loysning hevur við sær, at nýtslan av ADHD heilivági, ið inniheldur methylphenidate, minkar og betri eftirlit kann havast við nýtsluni.

Fyri teir 754 heilivágsbrúkarnir, ið uppskotið kemur at raka merkir tað, at teir skula oftarai á apotekið, og vandin fyri, at fleiri við ringum symptomum, tey, ið tørva heilivágin mest, ikki fara at megna at skipa soleiðis fyri, at tey bíleggja og heinta heilivágin. Tí fara hesi, at fáa tað verri og vandi fyri, at tey ikki megna foreldraleiklutin, arbeiði, lesnaðin, fólkaskúlan ella fella í gamlar vanar við rúsdrekkamisnýtslu ella øðrum. Vit halda ikki, at hendan loysnin fer at steðga tí, sum ætlar at selja heilivágin.

Verður hendan loysn sett í verk, skjýtur Landsapotekarin upp at gera eina broyting í KT-skipanini hjá Apoteksverkinum. Broytingin hevur við sær, at starvsfólkið á apotekinum, sum skal avgreiða umbønina um útflýgging av heilivágnum, sjálvvirkið far eina áminning (pop-up) um, at heilivágsnýtarin hevur fingið heilivágin innan seinasta mánaðin.

Apoteksverkið upplýsir, at áleið 8-20% av ADHD-heilivágsávísingunum stava frá kommunulæknum og áleið 80% frá psykiatriska deplinum og privatum serlæknaviðtalum. Tølini skulu takast við fyrivarni.

Fastir limir í Skrásetingarráðnum eru Landslæknin, Landsdjóralæknin og Landsapotekarin.

Mælt verður til, at Skrásetingarráðið kann gera av, at ADHD heilivágur við methylphenidate verður útflýggjaður í einari nøgd, sum svarar til 1 mánað nýtslu uttan mun til ordineraðu nøgdina

Generelt halda vit, at tað er lítið hald í uppáhaldinum at tað skal verða ein ovurnýtsla av ADHD heilivági, tí hagtølini vísa, at tað "bert" eru 3,5% av føroyingum, ið fáa útskriva heilivág. Hagtølini hjá WHO siga, at 5 % av fólkunum hava ADHD.
Vónandi fer hettar ikki at koma í gildi, tí tað fer bert at raka tey, ið longu hava tað stríggi.

ADHD felagið